# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.03.2014*

**Bygdaráðsfundur 31.03.2014 kl. 16.00 til kl. 18.45**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | forfall |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skr. | x |

**Til viðgerðar:**
**Mál nr. 27/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2012-0011-0032
**Málslýsing**
Ársroknskapurin fyri 2013 hjá Skálafjarðar Sløkkiliði er komin til ummælis hjá Nes kommunu. Høvuðstølini frá rakstrinum eru:

| | **R 2013** | **R 2012** |
|---|---|---|
| Nettoinntøka | 2.040.215 | 1.546.481 |
| Útreiðslur í alt | 1.724.844 | 1.676.591 |
| **Úrslit áðrenn avskriving/rentur** | **315.370** | **-130.109** |
| | | |
| Avskrivingar | 252.422 | 267.392 |
| Rentur | 5.296 | -1.242 |
| | | |
| **Ársúrslit** | **68.244** | **-398.744** |

**Tilmælið**
Á fundi 24.03.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum fyri 2013 soleiðis, sum hann er uppsettur.

Jóhannus Danielsen, sum er formaður fyri Skálafjarðar Sløkkilið, var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

Jóhannus Danielsen, sum er formaður fyri Skálafjarðar Sløkkilið, var úti meðan málið var viðgjørt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.03.2014*

**Mál nr. 28/2014 Byggimál**

J. nr. 2009-0042-0240

**Málslýsing**

Tekniska nevnd hevur arbeitt við einum uppskoti, um broytingar í orðingini til ognarbrævið, í sambandi við sølu av grundstykkjum. Eisini eru aðrar dagføringar gjørdar.

Høvuðsbroytingin er í §2 stk. 4, har orðingin er: Tað er ikki loyvt eigarinum at selja stykkið víðari, fyrrenn sethús eru bygd á stykkinum. Grundstykkið, sum ikki er bygt á, skal seljast aftur til kommununa.

Hetta verður broytt til: Kommunan keypir ikki seld stykkir aftur, men kann eftir ynski frá eigara seta tey til sølu á kommunala sølulistanum.

Kommunan gevur eisini loyvi til verandi eigara at selja stykkið á fría marknaðinum.

**Tilmælir**

Á fundi 18.03.2014 mælir Tekniska  nevnd til at taka undir við broytingunum, í Ognarbrævinum, soleiðis sum Ognarbrævið er uppsett.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 29/2014 Byggimál**

J.nr. 2014-0.042-0326

**Málslýsing**

Í skrivi 06.01.2014 søkja Húsahagi og Neshagi um loyvi til at byggja eitt felags seyðahús við Kornvatn, uml. har rættin hjá Leivur stendur í dag.

Somuleiðis verður søkt um ein traktorveg úr Agninum og norður móti rættini hjá Leivur, har ætlanin er at seta húsið.

Málið hevur verið til ummælis hjá Náttúrufriðingarnevndini.

18. februar 2014 er svar komið frá Náttúrufriðingarnevndini í Eysturoy viðv. bygging av felagsseyðahús.

Friðingarnevndin hevur viðgjørt málið og samdist um at loyva byggingini samsvarandi innsendu tekningum, men ikki at vegurin verður lagdur soleiðis sum skotið er upp.

Friðingarnevndin mælir til, at vegurin verður lagdur ígjøgnum matr. nr. 57.

Yvirfriðingarnevndin staðfestir avgerðina hjá Náttúrufriðingarnevndini fyri Eysturoy.

**Tilmælið**
Á fundi 18.03.2014 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi eftir teimum treytum, sum Friðingarnevndin ástur og at søkja Landsverk um íbinding til vegin.

Elin á Torkilsheyggi var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 30/2014 Havnamál**
J.nr. 2012-0046-0055
**Málslýsing**
Í illveðrinum, sum var í desembur 2013 og januar 2014, kom skaði á fylluna innanfyri verjugróti sunnanfyri og norðanfyri. Nógv hevur verið tosað um, hvat best er at gera fyri at bøta um hesi viðurskiftir.

Nes kommuna hevur biðið um uppskot á loysn og tilboð frá J&K Petersen og frá JHR Entreprenørar. Kommunan hevur fingið uppskot um loysn og tilboð frá báðum.

**Tilmælir**
Á fundi 18.03.2014 mælir Tekniska nevnd til at gera arbeiðið soleiðis, sum JHR skýtur upp og taka av tilboðnum frá teimum, áljóðandi kr. 368.000,- uttan MVG, og er hetta arbeiðið framhald av verandi grótgarði.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og mælir til, at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 31/2014 Byggimál**
J.nr. 2007-0042-0019
**Málslýsing**
Í skrivi 10. februar 2014 søkir Katrin Poulsen, festari um byggiloyvi til seyðahús eystanfyri Høganes.

Málið var sent til Náttúrufriðingarnevndina til ummælis. Náttúrufriðingarnevndin hevur viðgjørt málið, og er svar komið frá Náttúrufriðingarnevndini.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.03.2014*

Avgerðin hjá Náttúrufriðingarnevndini er send til endaligu støðutakan hjá Yvirfriðingarnevndini, og má onki arbeiði setast í verk fyrrenn skrivligt loyvi fyriliggur frá Yvirfriðingarnevndini.

**Tilmælið**
Á fundi 18.03.2014 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi eftir teimum treytum, sum Friðingarnevndin ásetur, og tá hesar eru staðfestar av Yvirfriðingarnevndini.

At bygt verður eftir føroyskum viðurskiftum.

Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 32/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2014-0023-0139
**Málslýsing**
Í skrivi 07.01.2014 spyr Felagið Føroysk Træseglskip um Nes kommuna er áhugað í Føroya Regatta á Toftum í 2015. Regattain er á hvørjum ári fyrstu viku í juli.

**Tilmælið**
Á fundi 20.03.2014 mælir Mentanarnevndin til at boða Felagnum Føroysk Træseglskip frá, at Nes kommuna er áhugað í, at Føroya Regatta verður á Toftum í 2015.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 33/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2014-0024-0021
**Málslýsing**
Í skrivi 02.01.2014 spyr Bátafelagið á Toftum, um tað ikki hevði verið eitt hugskot, at gjørt bátafestivalin á Toftum til eitt meira bygdarvinarligt tiltak.

**Tilmælið**
Á fundi 20.03.2014 mælir Mentanarnevndin til, at kommunan skipar fyri ymiskum tiltøkum í vikuni upp til Bátafestivalin, at tiltøkini verða, í mest møguligan mun, ókeypis, og at tiltakið verður nevnt sum Várdagar.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 34/2014 Umhvørvismál</u>**
<u>J.nr. 2014-0047-0034</u>
**Málslýsing**
Í skrivi 21. januar 2014 er skriv komið frá Jógvan Ingvard Olsen, har hann heitir á bygdaráðið um at friða Starvatn, og vísir hann á, at vit hava í høgum, sum hoyra til matrikkulin á Nesi og Toftum, náttúruøkir, sum treingja til eina verjandi hond, tað verið seg lendið við tey ymisku vøtnini.

Søkt hevur verið um stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk, og er umsóknin ikki gingin á møti.

**Tilmælið**
Á fundi 20.03.2014 staðfestir Mentanarnevndin, at ongin peningur er avsettur í inniverandi ári og mælir til, at søgt verður aftur um stuðul, til friðing av Starvatni, komandi ár.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 35/ 2014 Mentanarmál</u>**
<u>J.nr. 2014-0023-0142</u>
**Málslýsing**
Í skrivi 10. januar 2014 søkir Felagið Dvørgamoy, um fíggjarligan stuðul til teirra arbeiði, sum teir meta er av mentanarligum virði bæði fyri ung og eldri.

**Tilmælir**
Á fundi 20.03.2014 mælir Mentanarnevndin til at stuðla Felagnum Dvørgamoy við kr. 3.000,-.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 36/2014 Mentanarmál</u>**
<u>J.nr. 2014-0023-0143</u>
**Málslýsing**
Í skrivi 26. februar 2014 søkir Stanley Samuelsen um fíggjarligan stuðul til útgávu av eini nótabók, sum inniheldur 58 løg til yrkingar, hann hevur sett til 14 føroyskar yrkjarar.

**Tilmælir**
Á fundi 20.03.2014 mælir Mentanarnevndin frá at stuðla útgávuni av nótabókini.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 37/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2014-0024-0023
**Málslýsing**
Í skrivi 27. februar 2014 søkir Bátafelagið á Toftum um fíggjarligan stuðul fyri 2014.

**Tilmælir**
Á fundi 20.03.2014 mælir Mentanarnevndin til at stuðla Bátafelagnum við kr. 10.000,-, sum eru avsettar á fíggjarætlanini fyri 2014.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 38/2014 Mentanarmál**
J. nr. 2014-0024-0024
**Málslýsing**
Í skrivi 27. februar 2014 søkir Undirhúsið á Toftum um fíggjarligan stuðul fyri 2014.

**Tilmælir**
Á fundi 20.03. 2014 mælir Mentanarnevndin til at veita stuðul til Undirhúsið á kr. 5.000,-.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.03.2014*

**Mál nr. 39/2014 Mentanarmál**

J. nr. 2014-0059-0002

**Málslýsing**

Í skrivi 10. mars 2014 søkir Íverksetarahúsið um fíggjarligan stuðul áljóðandi kr. 5.000,- til tiltakið „Startup Skálafjørðin“, sum er eitt hugskots- og arbeiðsskapandi tiltak. Tiltakið verður í Løkshøll vikuskifti 23. til 25. mai, tiltakið er fyri øll.

**Tilmælir**

Á fundi 20.03.2014 mælir Vinnunevndin til at játta stuðul kr. 5.000,- til tiltakið Startup Skálafjørðin.

Á fundi 20.03.2014 tekur Mentanarnevndin undir við tilmælinum frá Vinnunevndini.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og Vinnunevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**

Tilmælini frá Vinnunevndini, Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 40/2014 Mentanarmál**

J. nr. 2014-0019-0062

**Málslýsing**

Í skrivi 07. mars 2014 søkir trivnaðarbólkurin fyri sjúklingahotelli Tórshavn, um stuðul til keyp av nýggjum bussi, sum er til sjúklingar og avvarðandi, sum búgva á sjúklingahotellinum. Verandi bussurin er 18 ára gamal.

**Tilmælir**

Á fundi 20.03.2014 mælir Trivnaðarnevndin frá at veita stuðul grundað á, at hetta ikki er eitt ábyrgdarøkið hjá kommununi.

Á fundi 20.03.2014 tekur Mentanarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Trivnaðarnevndini, Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.03.2014*

**Mál nr. 41/2014 Skúlamál**

J. nr. 2014-0021-0072

**Málslýsing**

Tofta skúli hevur arbeitt við at fáa eitt búmerki til skúlan, og fyriliggja nú tvey uppskot.

**Tilmælir**

Á fundi 20.03.2014 mælir Mentanarnevndin til at boða skúlanum frá, at ongin peningur er avsettur, á fíggjarætlanini fyri 2014, til endamálið.

Mentanarnevndin fegnast um at hugsað verður um búmerki til skúlan. Mentanarnevndin kundi hugsað sær, møguliga at fingið uppskot og tilboð frá meira enn einum veitara, og vil arbeiða víðari við málinum á einum seinni fundi.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 42/2012 Mentanarmál**

J. nr. 2014-0047-0035

**Málslýsing**

14. mars 2014 er skriv komið frá Agenda 21 um Umhvørvisátakið 2014. Átakið er skipað sum kapping, har kommunur og íbúgvar hava møguleika at leggja orku í náttúru- og umhvørvisvernd og í nærumhvørvið sum heild.

**Tilmælið**

Á fundi 20.03.2014 mælir Mentanarnevndin frá, at kommunan luttekur í Umhvørvisátakinum 2014.

**Avgerð**

Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 43/2014 Mentanarmál**

J.nr. 2013-0024-0017

**Málslýsing**

Í skrivi 17. mars 2014 søkir hondbóltsfelagið Tjaldur um at fáa fríar venjingartímar í fimleikarahøllini á Toftum veturin 2013/2014.

**Tilmælir**

Á fundi 20.03.2014 mælir Mentanarnevndin til, at Hondbóltsfelagið Tjaldur fær fríar venjingartímar í fimleikarahøllini á Toftum veturin 2013/2014.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 44/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2014-0023-0141
**Málslýsing**
Mentanarnevndin ynskir at fáa heimild til at avgreiða umsóknirnar um stuðul soleiðis, at ikki verður neyðugt, at allar umsóknirnar fara fyri bygdaráðið uttan so, at talan er um størri upphæddir.

Mentanarnevndin hevur arbeitt við eini reglugerð um stuðulspolitikk til Nes kommunu.

Reglugerðin kemur m.a. at geva Mentanarnevndini heimild til at avgreiða umsóknir um stuðul, sum er kr. 10.000,- ella lægri, meðan umsóknir sum eru hægri enn kr. 10.000,- skulu fyri Bygdaráðið, við tilmælið frá Mentanarnevndini.

**Tilmælir**
Á fundi 20.03. 2014 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við reglugerðini um stuðulspolitikk.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 45/2014 Trivnaðarmál**
J.nr. 2010-0015-0007
**Málslýsing**
Barnagarðurin hevur hugt eftir ymiskum og tosað um, hvat tey kundu hugsað sær til spæliplássið, og tað tey velja skal helst vera avbjóðandi fyri børnini.

Barnagarðurin hevur fingið tilboð uppá:

| | |
|---|---|
| Gynga | kr. 2.250,- |
| Klatriborg | kr. 34.750,- |
| Samansetan | kr. 3.000,- |

**Tilmælið**
Á fundi 20.03.2014 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Barnagarðinum at keypa útgerðina til spæliplássið, ið tey hava fingið tilboð uppá.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum Barnagarðinum íløga.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.